## VIÐMERKINGAR

# Áheitan

**Steen Blicher**
*Skopun*

Eftirsum eg tíverri ikki havi nakað floksblað at venda mær til, fari eg at biðja Sosialin geva mær innivist fyri hesum ørfáu reglum.

Fari bara heilt stutt at heita so inniliga á allar tjóðveldisveljarar kring landið, um at fara á val 8. febr.

Vit tjóðveldisfólk eru helst øll meira ella minni samd um, at eitt fólkatingsval í roynd og veru átti bert at verið fyri danir. Men vit vita eisini, at støðan tíverri ikki er soleiðis – enn.

Tveir føroyingar *skulu* niður á Danating at umboða okkum. At tala okkara søk.

Latum okkum tí semjast um, at vit skulu hava minst annan. Vit mugu ásanna, at umboð okkara har niðri seinnu árini mangan er komið væl við.

Vón mín skal vera, at tjóðveldisfólk hugsa um hetta og fara fjølment á val. Og sjálvandi eru allir aðrir føroyingar eisini hjartaliga vælkomnir at veita okkum – og harvið sær sjálvum – eina hjálpandi hoind.

Tjóðveldisrøddin má ikki tagna!

# Sambandsflokkurin er trygdin fyri at tit ungu hava frítt at velja útbúgving – í Føroyum og um allan heim

**Alfred Olsen**
*Títt valevni á Sambandslistanum*



VAL05

Tit ungu eru framtíð okkara. Tað eru tit sum koma at stýra vinnulívinum og samfelagnum í framtíðini. Fyri at tit kunnu vera so væl fyrireikaði sum gjørligt til hesa uppgávu, vil Sambandsflokkurin virka fyri, at tit hava bestu møguleikar at taka eina útbúgving, sum kann styrkja tykkara persónliga frælsi.

Altjóðagerðin og størri førleikakrøv eru veruleikar í dag, og lærdómur gerst eitt alt meira neyðugt virkisamboð innan øll øki í framtíðini. Tí er neyðugt, at tit ungu fáa ta neyðugu útbúgvingina til framtíðar virki tykkara.

Politikkurin hjá Sambandsflokkinum er trygdin fyri at bæði tað føroyska og tað danska undirvísingarverkið og lærustovnar í øðrum londum standa opin fyri tykkum, eisini í framtíðini.

**Okkara skylda**

At tryggja okkara ungu møguleikar til at økja vitanarstøðið og styrkja tað persónliga frælsi við at taka eina útbúgving er skylda hjá okkum øllum.

Tí er áheitan mín á bæði ung og eldri, at tit valdagin velja trygdina fyri øktum útbúgvingarmøguleikum í framtíðini

Tað gera tit best við at velja Sambandsflokkin.

# Vit fáa tað sum vit vilja hava tað

**Tær avmarkingarnar í ríkisfelagsskapinum, sum loysingarflokkarnir eru so grammir at vísa á, hava tað við at minka munandi, tá vit hyggja nærri at teimum.**

**Helgi Abrahamsen**
*valevni Sambandsfloksins til fólkatingsvalið*



VAL05

Tað er so synd í okkum føroyingum, hoyrist javnan frá teimum, sum berjast fyri at fáa okkum úr verandi ríkisfelagsskapi, stundum við góðum og stundum við illum.

Vit fáa ikki sjálvstøðuga umboðan í altjóða hvalaveiðunevndini, vit eiga onga flaggstong í New York o.s.fr. Søgurnar kenna vit. Søgur um, at einki ber til, tí danir siga nei.

Veruleikin er, at vit fáa alt tað, sum vit vilja hava. Vit kunnu saktans fáa sjálvstøðuga umboðan í altjóða nevnd og hvørjum felagsskapi tað skal vera. Men tað hevur sín prís, og prísurin er, at so mugu vit úr danska ríkinum, og harvið missa vit nógv av teimum rættindunum, sum vit hava í dag. Tann prísin vil meirilutin av føroysku veljarunum ikki gjalda, og tí sigur veljarin nei til loysing.

Føroyski veljarin veit, at vit hava bert tveir valmøguleikar, og tí ræður um at velja tað, sum gagnar okkum mest - um tað so skal kosta onkrum ein almennan nevndarsess. Meirilutin av Føroya fólki sær størri møguleikar í ríkisfelagsskapinum, enn í til dømis altjóða hvalaveiðunevndini.

Danska stjórnin hevur greitt boðað frá, at um føroyingar velja loysing, so verður loysing. Í tí málinum er full semja millum partarnar í felagsskapinum.

Tað gevur tí onga meining at loysingarsinnaðir føroyingar sita og granska gamla jura, fyri at finna feilir, sum danir skulu hava gjørt. Hesir politikarar stríðast á skeivum hermóti, tí teirra fíggindi er ikki danska stjórnin, men føroyski veljarin og demokratiið.

## Gjald fyri valgreinar

Eins og tað hevur verið vanligt í tíðini fram til eitt val, fer Sosialurin aftur hesa ferð at taka gjald fyri valgreinar, sum verða settar í blaðið, hetta fram til fólkatingsvalið.

Gjaldið fyri valgreinar er helvtin av vanligum lýsingarprísi.

**Sosialurin**

# Aftur til tað gamla í føroyskum politikki?

**- Tjóðveldisflokkurin er verjan móti afturstigum og framherji fyri framtíðini**

**Høgni Hoydal**



VAL05

Fólkatingsvalið er eitt val, um hvørja leið, vit skulu halda í føroyskum politikki. Skulu vit framá ella afturá?

Hetta er eitt gylt høvi hjá veljarunum at senda eini týðilig boð til politisku skipanina. Skulu eisini fólkatingsessirnir nýtast til eitt parkeringspláss fyri allar hugsjónir og øll frælsismál í føroyskum politikki? Ella skulu vit nýta hetta valið og hesar sessir til at halda kósina móti eini frælsari framtíð?

Óli Breckmann segði tað so rámandi í samrøðu við Útvarpið. At nú er føroyskur politikkur farin aftur í tað gamla lagið, og tí vónaði hann at fáa eitt gott val.

**Bert rumbul og ongin kós – stúgvandi fult eins og sild í dós**

Jú, nógv bendir á, at vit eru farin aftur í tað gamla í føroyskum politikki.

ABC-flokkarnir hava valt at virka eftir sambandsins ABC.

Búskaparliga skilið er blakað á bláman. Við risastórum halli á fíggjarlógini lata teir skattalættar til tey ríkastu.

Kring landið skulu fólk sita og bíða eftir, at samgongan semist um at orðna tingini. Og tá tær sonevndu breiðu semjurnar loksins verða kunngjørdar - so er tað ber luft.

Studningur til vinnuna er á veg aftur í føroyskan politikk – og vinnulívið bíðar eftir, hvat ABC-flokkarnir munnu fara at finna uppá.

Alt skapandi virksemi í samfelagnum verður køvt og lagt undir dýnuna hjá ABC-flokkunum.

Gransking, mentan og útbúgving, sum eru vegurin til eina ríkar og frælsar Føroyar, verða skerd og burturgoymd við tómum tosi.

Øll mál verða parkerað og ongin kós er at hóma nakrastaðni, hóast samgongan er stúgvandi full í tinglimum.

**Niðurbinding í fullveldismálinum**

Í fullveldismálinum vilja ABC-flokkarnir krúpa niður í posan hjá donskum flokkum, sum vilja binda kjaftbandið fast um danska eindarríkið.

Í ES-málinum hava ABC-flokkarnir lagt avgerðirnar á hendurnar hjá donskum politikarum.

Enn ikki spurningin um limaskap í Norðurlandaráðnum, hevur henda samgongan sett krøv fram um, men góðtekur donsku forðingarnar.

**Tjóðveldisflokkurin hevur greið úrslit og greið boð**

Mótvegis hesum stendur Tjóðveldisflokkurin sum verji fyri, at føroysk áhugamál ikki verða avreidd í máttloysinum hjá ABC-flokkunum.

Men Tjóðveldisflokkurin stendur eisini sum framherji fyri, at vit koma framá í føroyskum politikki.

- Vit hava greið boð um, hvussu Føroyar skulu vinna á mál sum sjálvstøgt land.
- Vit hava greið boð um, hvussu vit skulu slóða okkum ræsir mótvegis ES.
- Vit hava greið boð um, hvussu vit fáa áræðið og viljan innaftur í føroyska samfelagið.
- Vit hava greið boð um, hvussu Føroyar skulu mennast sum eitt nútímans land í altjóða samstarvi.

Á Fólkatingi hava vit prógvað, at tað ber til at røkka úrslitum og vinna sær virðing gjøgnum miðvíst arbeiði.

Tí er valið greitt.

Vilja vit aftur til tað gamla í føroyskum politikki, so skulu vit velja ABC-flokkarnar.

Vilja vit framá í føroyskum politikki og í heiminum, so skulu vit velja Tjóðveldisflokkin.